búnum. Bygdarfólkið stúra fyri kinversku hertøkuni, og tey kenna á sær, at teirra lívsháttur er hóttur.

Ein gamal maður gevur Dalai Lama ein hvítan hest, sum sambært tibetanskum siði, fer at geva eydnu.

Nú er fylgið komið uppá 350 tibetanskar hermenn, og minst 50 mótstøðufólk.

## 18 tímar í saðlinum

Dalai Lama frættir skjótt, at kinverjar vilja gera alt fyri at handtaka hann, og tí ger hann av at vera 18 tímar í saðlinum um samdøgurið.

Eftir fimm samdøgur koma teir til ein part av Tibet, har mótstøðurørslan hevur valdið. Í býnum, Chenye fær bólkurin skjól í einum kleysturi. Dalai Lama kallar sínar ráðgevarar saman, og teir samráðast um Dalai Lama skal halda fram við at flýggja, ella um teir skulu taka upp samráðingar við kinverjar. Avgerð verður tikin um, at teir skulu halda fram til Lhuntse, ein av teimum mest fjarskotnu bygdunum í fjallalendinum.

Á veg til Lhuntse frættir Dalai Lama, at kinverjar hava bumbað tibetanska høvuðsstaðin, Lhasa sundur og saman. Húsini í Lhasa stóðu í ljósum loga, og kring Norbulingka-borgina, vóru túsindtals lík. Kinverjar kannaðu hvørt lík, fyri at kanna um nakar var Dalai Lama.

Dalai Lama tekur avgerð um at halda fram til Lhuntse Dzong. Fylgið er nú komið til tey strævnastu økini í tí trans-himmalayiska økinum. Fjallaketan strekkir seg yvir 1000 kiometrar, og á summum støðum er hon 200 kilometrar breið.

Fylgið kemur til eina lítla bygd, sum nevnist E-Chhudhogyang. Bara 400-500 fólk hoyra til bygdina, og øll eru blóðfátæk.

Bygdarfólkini eru blíð, og bjóða Dalai Lama og fylgi hansara inn, sum gestir. Aftan á fleiri dagar á hestabaki, eru øll útlúgvaði, og eym í øllum kroppinum.

## Stjórn í útlegd

Staddir í E-Chhudhogyang frættir Dalai Lama syrgiligu tíðindini um, at Kina hevur uppløyst tibetansku stjórnina, og harvið øllum samstarvi við Dalai Lama.

Komin til Lhuntse Dzong tekur Dalai Lama avgerð um at tilnevna eina tibetanska stjórn í útlegd. Dalai Lama steðgar bara tveir dagar í Lhuntse Dzong, men røkkur at útnevna eina stjórn í útlegd, og hann boðar frá, at hann tekur frástøðu frá sáttmálan við teimum 17 punktunum.

Skjótt frættir Dalai Lama, at kinverjar hava herdeildir í fjøllinum nærhendis. Á midnátt sama dag sendir hann eitt sendiboð til India, har hann biður indisku stjórnina hjá Jawaharlai Nehru um politiskt friðskjól. Klokkan fimm um morgunin fer hann so sjálvur ta síðstu leiðina til India.

Næstu dagarnir uppdagar Dalai Lhama, at kinversk flogfør leita eftir honum, og at tað hastar at koma til India. Tá fylgið kemur til Mangmang, sum er síðsta bygda staðið, áðrenn indiska markið, kemur sendiboðið aftur við boðum um, at indiska stjórnin bjóðar honum vælkomnum.

Frostbitin, avmaktaður og sjúkur verður Dalai Lama førdur yvir um markið.

Samstundis sum hann er lættur um at vera sloppin undan kinverjum, so er hann djúpt óeydnusamur um, at vera noyddur at flýggja úr heimlandi sínum.

Og 50 ár seinni droymir hann framvegis um, at Tibet skal gerast frælst aftur.

